# Kjak



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Fylkist um framburð Føroya

Tarnandi tvíbýtingin

Føroyingar eru heimsmeistarar í tvíbýting og hava olympiskt potentiali í tvídrátti. Uttan mun til hvat evnið er, svitast tað ikki, at vit fara í tvinnar bólkar og tvíhalda um okkara sannføringar. Hetta síggja ella hoyra vit hvønn dag: útjaðari mótvegis miðstaðarøki, samband mótvegis loysing, tað almenna mótvegis privatu vinnuna; og tvídráttur millum grannabygdir, grannakommunur, grannaoyggjar; eisini er tvídráttur millum sjúkrahúsini, ímillum summar skúlar, millum bóndir, sjófólkið og fólkið á landi, ja enntá innanhýsis í okkara politisku flokkum. Nú er nóg mikið. Um vit ikki skjótt byrja at draga somu línu og sama veg, so verður dýrt og trupult hjá okkum at minka um skuld og skapa framburð og trivnað.

### Felags vinningur

Øll vinna við at gera sítt. Vit skulu effektivisera tað almenna.

Dømi: Skúlalærarar á øllum økjum kunnu t.d. hava eina minni fasta løn, og í staðin fáa góðar samsýningar fyri avrik sum t.d. umsetingar, frymlar til tulkingar og skriving, og mangt annað undirvísingartilfar, sum kemur okkara næmingum til góðar, samstundis sum tað mennir lærararnar. Tað eru ongar føroyskar bøkur fyri yrkislærugreinirnar á Tekniska skúla – umseting tørvar eins og egið tilfar.

Í Havnardali hav bóndirnir tikið lógvatøk saman og gjørt eitt stórt og nýmótans fjós, sum framleiðir 1/3 av mjólkini til MBM. Klandur millum bóndir tarnar teirra menning og møguleikar. Um vit fáa færri og størri kommunur, verða tær eisini nógv sterkari og betri. Tá er møguligt at skapa trivnað. Vegasamband skapar ikki trivnað; tað ger eitt livandi og fjøltátta umhvørvi í bygd og í bý – "maður er manns gaman"; gloym ikki tað.

Effektivisering í fiskivinnuni fer at minka um flotan, men so kann tann arbeiðsmegin nýtast á landi – góðsking til matna hevði gjørt fiskivinnuna á landi størri og nógv meira lønandi. Tað er eingin vanlukka. Eitt land, har fólk verða viðfarin ymiskt, skapar eisini tvíbýting og misnøgd. Tí er upp á tíðina, at farið verður frá sjómannafrádráttinum, yvir eina skiftistíð upp á eitt skilagott áramál, og soleiðis byrjar sjófólkið at gjalda skatt eins og øll onnur.

Spurningurin um samband og loysing fer ikki at broytast, men tað má koma í aðru rekkju. Nú skal høvuðsorkan nýtast til at gera Føroyar aftur til eitt gott land at liva í. Her er hóskandi at leggja afturat, at MVG á gerandis matvørum eigur at burturbeinast beinanvegin. Tá vit tosa um at fáa útisetar heim, so er tað bústaðarprísir og íbúðarmøguleikar saman við matprísunum, sum vigar mest. Hetta skal upp á pláss alt fyri eitt.

### Vit eru øll í sama báti

Hetta eru ítøkilig dømi, hóast tey ikki eru neyvt útgreinað, sum kann vera við til at bera okkum fram ímóti einum ynskiligum samfelag, har øll gera sítt. Her er ikki pláss fyri sjálvsøkn og fyrilitarleysum lokalpolitikki. Hetta snýr seg ikki miðstaðar øki, smábygdir ella útjaðara í sjálvum sær, men um allar Føroyar og allar føroyingar – eisini teir, sum lesa ella arbeiða uttanlands.



Jógvan Sundstein

## Tilfeingisgjald, Burðardygd, Marknaðarbúskapur

### Fyrispurningur til Kaj Leo Johannesen, løgmann

Tað hevur altíð áhuga, tá ein floksformaður kemur við síni frágreiðing á einum flokslandsfundi. Ikki minst tá hesin floksformaðurin samstundis er stjórnarleiðari. Tí kundi eg hugsað mær at fingið nærri útgreinað nakrar útsagnir hjá løgmanni á seinasta landsfundi Sambandsfloksins.

Men áðrenn eg komi til sjálvar fyrispurningarnar vil eg gjarna endurgeva eitt sindur av tí, sum eg haldi meg minnast frá tíðini fyrst í nítiárunum, tá lógin um vinnuligan fiskiskap var tilevnað og samtykt.

Tá arbeiddi ein politiskur bólkur við uppskotinum. Eg haldi ikki, at eg minnist galið, at persónarnir vóru: John Petersen, Thomas Arabo, Henrik Old og Olaf Olsen. Lógin snúi seg um stýring av fiskivinnuni. Fyri at hetta kundi lata seg gera skuldi landsstýrið hava ávísar heimildir. Ein orðing mátti tí finnast, sum gav landsstýrinum hesar heimildir. Aftaná drúgva viðgerð funnu nevndu politikarar eina orðing, sum ljóðaði nakað soleiðis, at fiskatilfeingið var ogn Føroya Fólks. Umboðandi Føroya Fólk, kundi landsstýrið sostatt seta ymiskar stýringsreglur í gildi.

Orðingin var í sínum uppruna sostatt ætlað sum ein heimild hjá landsstýrinum at reka fiskivinnupolitikk og ikki, sum hon í nútímans dagliga politiska tjakinum verður brúkt og misbrúkt, at fordeila eitt ávíst tonsatal av fiskatilfeinginum til hvønn føroying.

### Aftur til fyrispurningin

Nú er so nógv hent á politiska økinum seinastu dagarnar, men beinleiðis orsøkin til, at eg spyrji løgmann, er, at hann á landsfundi hjá Sambandsflokkinum proklamerar, at nú skal tilfeingisgjald setast í gildi. Hetta gjaldið skal samstundis tryggja okkum eina burðardygga fiskivinnu og tryggja okkum, at vinnan fær marknaðarbúskaparligar karmar.

Fyrispurningurin hjá mær er tí í fyrsta umfari:

1. Hvat tilfeingi snýr tað seg um ?
2. Hvat er definitiónin av tilfeingisrentu?
3. Hvat er definitiónin av tilfeingisgjaldi?
4. Um tilfeingisgjald verður gjøgnumført, er so høvuðsætlanin at útvega inntøkur til landskassan ella at betra um rentabilitetin hjá fiskivinnuni? Kunnu hesi sameinast?
5. Hvørji lond, sum vit kunnu samanbera okkum við, hava tilfeingisgjald av týdningi á fiskivinnuna, og hevur skipanin havt við sær ein "reform" av vinnuni í viðkomandi landi? (t.d. burðardygd, fríari marknaðarkreftir v.m.)
6. Nú haldi eg ikki, at løgmaður sjálvur hevur umrøtt so nógv skipanina við "tilfeingisbú", men aðrir hava gjørt tað. Er ein slík uppboðssøla til gagns fyri virðisøkingina av føroysku fiskframleiðsluni? Ella á annan hátt fyri føroyska fiskivinnumhvørvið sum heild? Hvussu skal hon nágreiniliga skipast?

### Viðmerkingar

Lat meg siga, fyri at eingin misfatan skal vera, at eg ynski alt tað besta fyri føroysku fiskivinnuna, og at hendan framhaldandi má mennast sum týdningarmesti grundvøllurin undir føroyska búskapinum. Tí haldi eg eisini, at fiskivinnulóggávan alla tíðina eigur at verða fylgd upp og dagførd. Lat meg eisini siga, at eg havi lisið arbeiðsskjal fyri Fiskimálaráðið frá 24.02.2011 um "Tilfeingisgjøld á fiskivinnuna". Tað er upplýsandi, men inniheldur ikki nakað uppskot um "reform".

Seinastu dagarnar havi eg nakrar ferðir hoyrt løgmann siga orðini: "Tað er ikki bara, bara." Tað gevi eg honum rætt í. Tí eigur hann at ímynda sær heilt greitt, hvat hann vil, tá hann leggur upp til eina skipan við tilfeingisgjaldi og líknandi tiltøkum. Tí vænti eg eisini at fáa eina útgreinandi frágreiðing um mínar spurningar. So kunnu hansara ætlanir metast út frá svarinum.



Zakarias Wang

## Fólkaatkvøða í Íslandi og her

Nú hevur íslendska fólkið enn einaferð víst tingmonnum sínum, hvar ið skápið skal standa, og at altingið ikki hevur alt vald.

Eftir er hjá okkum at spyrja, hvussu tað ber til, at vit ikki enn hava fingið einar frælsar Føroyar, eins og vit á fólkaatkvøðuni í 1946 bóðu ting okkara at gera.

Vit vita jú øll hvør orsøkin er:

Í staðin fyri at vera fólksins vilja lýðin, hevur løgting okkara sett eina korrupta skipan í verk, har útlendskur peningur verður oystur út yvir oddafiskarnar í landi okkara. Strámenninir fáa peningin av tí, at teir ikki duga at stýra, og verri teir stýra, meir fáa teir.